Summarkapping 2008
LÝSINGARTILFAR

# London – ein veruligur heimsbýur



**London er so vælumtókt sum ferðamannamál, at íbúgvaratalið upp á 7,5 milliónir tvífaldast summarmánaðirnar. Býurin hevur so nógv at bjóða ferðamanninum sum eingin annar**

London er størsta bygda umráðið og høvuðsstaður í Onglandi og Bretlandi. Søgan er tvær øldir gomul og gomgur heilt aftur til tíðina, tá rómarar fyrst settu búgv har.

Síðani London varð bygt hevur býurin verið miðddepilin fyri mongum týðandi hendingum upp gjøgnum søguna, so sum ensku renesansuna, Ídnaðarkollveltingina og gotisku endurreisnina.

Kjarnin í býnum, gamla City of London, hevur enn síni avmarkaðu miðaldar mørk; men síðani í minsta lagi 19. øld hevur navnið London eisini merkt allan metropolin, sum hevur ment seg rundan um gamla býin. Meginparturin av hesum býarvøkstri skapar nú London økið av Onglandi og Greater London umsitingarliga øki, sum hevur egnan borgarstjóra og umsiting.

London er í dag ein av mest týðandi býunum í heiminum innan handil, búskap og mentan, og ávirkanin á politik, útbúgving, undirhald, miðlar, móta og list alt merkir, at býurin hevur eina støðu sum ein av allarstørstu býunum í heiminum.

Tú finnur eisini í London fýra »World Heritag Sites« (bygningar ella annað, við serligum søguligum virði): Westminster slottið, Westminster Abbey, St. Margarets Kirkjan og Tower of London.

Hartil koma niðursetibygdin Greenwich og Royal Botanic Gardens í Kew.

London er vorðin eitt av best umtóktu ferðamannamálunum í heiminum, og íbúgvaratalið er økt munandi orsakað av búskaparliga vøkstrinum. Sagt verður at íbúgvaratalið upp á 7,5 millónir tvífaldast summarmánaðirnar.

Býurin hevur ein ógvuliga blandaðan íbúgvaraskara, við øllum møguligum fólkasløgum, mentanum og religiónum. Tosað verða fleiri enn 300 tungumál í London, sum eisini hevur størsta kinesiska samfelagið í heiminum – burtursæð frá New York.

Í 2006 tølum búgva 7.512,400 fólk innan mørkini av Greater London, og er hetta tættast fólkaða økið í ES. Í 2001 hevði Greater London Urban Area eitt íbúgvaratal upp á 8.278,251 og samlaða økið um London er mett at hava eitt íbúgvaratal millum 12 og 14 milliónir.

Vit fara í hesum og komandi fýra bløðunum at greiða frá nøkrum av teimum mongu hundrað støðunum, sum London kann bjóða ferðamanninum.

**Puntur nr.**







Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari